TILBOÐ

so leingi vøra er á goymslu

**GOSBAÐ**
- Við 10 jetdysum og frontpanel. Uttan armatur
- Veitingartíð 4-6 vikur

vanligur prísur 11.498,-

BERT 9.598,-

spar 1.900,-

**Laminatgólv**
- Easy snap system
- Ahorn ella bók

68,- pr. m²

**HVÍTT BAÐIRÚMSMØBIL**
- Við handtøkum, vaski, spegli og ljósi, men uttan blandingsbattarí.
- Verður latið samlað

vanligur prísur 7.098,-

BERT 3.898,-

spar 3.200,-

damor

KVÍGGJARTÚN 3 • ARGIR • TEL 315415 • FAX 319001



**Havnar Arbeiðskvinnufelag**

Skrivstovan er stongd vegna summarfrí frá 26. juli til 16. august.

**Nevndin**



Sosialurin

www.sosialurin.fo




*Gøtumaðurin Òla Jákup Thomsen, avmyndaður á Gøtusandi, hevur latið sítt fyrsta yrkingasavn úr hondum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ein dropi úr havinum

**Gøtumaðurin Óla Jákup Thomsen hevur latið sítt fyrsta yrkingasavn úr hondum**

ÚTGÁVA


*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*


*"Summar vælafturkomið tú*
*vera skalt*
*nýggju mánaðir síðani*
*síðst mangan var kalt*
*við lívgandi sól og summar*
*hita*
*ofta vár longsul úti aftur*
*kunna sita"*

*- Brot úr yrkingini Grør um angandi grót*

Yrkjarin Óla Jákup Thomsen úr Gøtu hevur latið sítt fyrsta yrkingasavn úr hondum. Savnið kallast "Ein dropi úr havinum" og inniheldur tretivu yrkingar. Savnið er í tveimum pørtum, har fyrsti partur eru yrkingar upp á rím, og seinni partur eru orðaspøl.

Í innganginum sigur rithøvundurin, at yrkingar uppá rím í føroyskum yrkingahøpi tey seinastu nógvu árini hava verið sum lundi á jólanátt. Tí hevur Óla Jákup valt at geva nakrar av slagnum út í nýggju útgávuni.

## Skipari

Óla Jákup Thomsen er útbúgving skipari og hevur siglt víða um. Hann hevur seinasta hálva árið arbeitt intensivt við savninum.

– Nú hevði eg so nógv tilfar liggjandi, at eg helt tað rætta tíðspunktið at geva út, sigur Òla Jákup Thomsen.

Honum dámar væl at yrkja, og hann sigur seg finna besta arbeiðsfriðin tíðliga um morgnarnar.

Savnið verður givið út á egnum forlagi, ið kallast Stjørnustøv. Savnið er 54 síður og kostar 120 krónur í sølubúðunum. Føroyaprent hevur umbrotið og prentað.

*Standi á síðulinjuni og*
*hyggi*
*ja hyggi eftir spælinum*
*fyri gallarínum*
*ímeðan onnur halda*
*gallaveitslu fyri spælinum*

*- Yrkingin Eygleiðan*


Ólavsøkutilboð
frá Televarpinum...

Keyp
Televarpsmóttakara
fyri einans

995,-
spar 700,-

Treytað av 12 mðr. televarpshaldi!

-og síggj Televarpið ókeypis til 1. september 2004!

Tilboðið er galdandi til 31. august 2004

Televarpið ynskir øllum eina góða Ólavsøku!

SAS-ligan á TV3 og 3+

Tú sært Televarpið:
í Klaksvík
í Leirvík
í Fuglafirði
í Gøtu
í Rituvík
partvís í Lamba
á Skálafjørðinum
á Morskranesi
á Selatrað
í Kollafirði
á Oyrareingjum
á Signabø
í Kaldbak
á Hvítanesi
í Hoyvík
í Tórshavn
á Argjum
í Nólsoy
partvís í Skálavík

Allar tær bestu rásirnar finnur tú í Televarpinum!

PREMIER LEAGUE

Brennir tú fyri fótbólti?

Finn sølustøð á www.televarp.fo
ella ring á 340340
Televarpið

team85




# 130 ár síðani Føroyar høvdu fyrstu kongavitjanina



*Kongaminnið í Havn varð bygt sum minni um fyrstu kongavitjanina í Føroyum. Tað var tann 25. juli í 1874, at Christian IX kongur og Valdemar prinsur stigu á land innast á Eystaru vág í Havn, sum síðani hevur itið »Kongabrúgvin«*

Í gjár vóru liðin 130 ár, síðani danakongur á fyrsta sinni vitjaði Føroyar.

Christian tann 9. og Valdemar prinsur við fylgi kom til Føroyar tann 25. juli 1874.

Tá gamli skúlalærarin, Andreas Christian Lützen, ið var tann fyrsti av Lützenættini í Føroyum, tók ímóti, small hann deyður í føvningin á kongi.

A. C. Lützen var løgtingsmaður og borgarstjóri í Havn.

Tá á døgum var samskiftið ikki sum nú, og fólk gingu úti á Kirkjubøreyni og hugdu, nær kongaskipið fór at koma. Fyri at halda varmanum fóru tey undir at laga varðarnar, sum enn tann dag í dag standa á Kirkjubøreyni.

Tveir dagar seinni, fór kongaskipið víðari til Íslands, sum tá eisini var undir danska kongahúsinum.

# Gott ár hjá Nes Kommunu

**Fólkatalið er økt, nógv virksemi er og skattainntøkurnar eru á leið tað, sum mett varð um. Nes Kommuna er væl nøgd**

TÍÐINDASKRIV

Nú gott og væl eitt hálvt ár er farið aftur um bak av 2004, verður samandráttur av rokniskapinum, um gongdina í farna ári hjá Nes kommunu, borin út til øll húski í kommununi.

Bygdarráðið kann staðfesta, at 2003 royndist væl hjá kommununi, bæði fíggjarliga og eisini í aðrar mátar. Í mun til onnur økir í landinum kunnu vit frøast um, at tað er so at siga einki arbeiðsloysi í kommununi. Vit kunnu staðfesta, at skattainntøkurnar vóru eitt sindur hægri enn roknað var við.

Fólkatalið í kommununi er økt, og eisini er eftirspurningurin eftir grundøki til bústaðarbygging vaksandi.

Arbeiðið við at gera eldrasambýlið er liðug. Tey fyrstu búfólkini flyta inn uml. 01. sept. og er pláss fyri 16 fólkum.

Útstykkingin Heygarnar-Gadd er væl ávegis, og nøkur stykkir eru matrikulerað og seld, meðan enn fleiri verða klár í 2004.

Av arbeiðum sum eru í gongd í 2004 kunnu nevnast:

Kommunan arbeiðir í løtununi við at dýpa bátahylin inni í Oyrunum, fyri at gera pláss til trolbátarnar. Hetta vil føra við sær, at tað fer at verða rúmligari, við Toftagjógv, hjá teimum skipum og bátum, ið skulu landa á Toftum.

Endiliga er gongd komin á við at fáa vegin úti á Nesi breiðkaðan, og vónandi kann arbeiðið gerast liðugt í ár.

Viðvíkjandi skúlanum kann nevnast, at kommunan í eina tíð hevur sett pening av á fíggjarætlanini, til skúlaútbygging. Eftir ætlan, fer arbeiðið við skúlavíðkanini í gongd um ársskiftið.

Higartil í ár eru skattainntøkurnar á leið tað sum mett varð um og vóna vit, at hetta kemur at halda.

Í samandráttinum, sum verður borin út til øll húskir í kommununi, sæst meiri nágreiniliga, hvussu 2003 hildnaðist hjá Nes kommunu, sigur bygdarráðið á Nesi í tíðindaskrivi.

# Fløguaktuellir bólkar á ólavsøkukonsert

**Árliga Ólavsøkukonsertin verður týskvøldið 27. juli kl. 20 í Kommunuskúlagarðinum**

KONSERT

*Tíðindaskriv*

Í ár spæla: Paradox, GóGóBlues, Gestir, Headache Blues Treo, I Am, Fluffy Toys, Páll Finnur Páll, Hatespeech, Gunnar Mikkelsen, Kristel Lisberg, Týr og Makrel.

Bróðurparturin av hesum bólkum eru fløguaktuellir í ár. Sum nakað nýtt verður ein básur settur upp á konsertøkinum, har møguleiki verður at ogna sær fløgur frá luttakandi bólkunum við stórum avsláttri. Fløgan hjá Týr er distribuerað langt út um føroysku landoddarnar, og Makrel eru glóðheitir við síni spildurnýggju fløgu, ið eisini verður at fáa á básinum.

Páll hevur júst Funnið Páll aftur, og leggja í løtuni síðstu hond á aðru fløguni.

Einasta útlendska navnið á konsertini í ár verður navnframi Gunnar Mikkelsen, ið vann kappingina hjá DR "Stjerne For En Aften" í fjør. Við sær hevur hann so navnframar menn sum Jóhannus á Rógvu Joensen á bass, Kim Hansen á klaver og sang, James Olsen á trummum, og Jens Marna Hansen, sum vit kenna frá All That Rain á guitar og sang.

Týr hava fingið Terja Skibenæs aftur í bólkin, og teir fara dagin eftir Ólavsøkukonsertina av landinum á konsertferð. Kristel Lisberg hevur kosið sær Arnold Ludvig frá Føstufressum, Mikkjal Hvannastein úr Aria og James Olsen, Torbjørn, Óluvu og Anju til sína framførslu á Ólavsøkukonsertini.

Fluffy Toys ætla sær at bresta nakrar konsertbumbur afturat tí harða melodiøsa rockinum í síni skrá.

I Am eru í toppform og skulu eins og Týr av landinum at framføra í næstum.

Vit fáa Gestir á Ólavsøkukonsertini, teir hava vant dúgliga síðani G!, og fara saman við Eivør Pálsdóttir og Makrel eisini av landinum í august.



Harumframt spæla Headache Blues Treo, Páll Finnur Páll, Hatespeech og GóGóBlues.

Tað hevur síðan seinast í 1990'unum verið fastur táttur, at vinnarin av PopTop-kappingini er fyrsti bólkur á pallinum. Í ár verða tað sostatt Paradox, ið byrja konsertina.

Frásøgumaður á konsertini í ár er Jákup Veyhe úr Pipar&Salt.

Pallurin er settur upp av kønum fólki, tað eru Jóan Pauli Johansen og Birgir Sondum, ið hava staðið fyri uppsetingini. Ljóðroyndirnar byrjaðu longu mánakvøldið, hetta tí at talið av luttakandi bólkum er væl størri enn undanfarnu ár. Fimm ljóðtøkningar, ein ljóstøkningur, og nógv onnur professionell fólk eru við til at gera eitt brak av eini konsert.

FUT heitir inniliga á fólk um at lata glasfløskurnar liggja eftir við hús og fylla løgin í plastfløskur.

Tað er FUT (Føroya UndirhaldsTónleikarafelag), ið skipar fyri konsertini.